# Frágreiðing til aðalfundin hjá Svimjisambandi Føroya




Fyri tíðarskeiðið 9. apríl 2022 til 23. mars 2023

# Felagsskapurin

## Starvsnevnd

Hetta árið var starvsnevnd SSF: Rókur í Jákupsstovu, formaður, Símun Michael Sørensen, næstformaður, Ólavur Hansen, skrivari, Sabina Poulsen og Dann Hjelm, nevndarlimir, umframt Hálvdan Rúni Gaardbo, tiltakslimur. Starvsnevndarfundir hava verið umleið eina ferð um mánaðin.

Símun Michael Sørensen og Ólavur Hansen hava í sambandi við hendan aðalfund fráboðað, at teir ikki ynskja at taka við afturvali, og vilja vit hervið takka teimum fyri teirra tíð í starvsnevnd SSF. Vónandi eru teir ikki alt ov langt burturi, tí ofta hevur verið brúk fyri teimum.

## Svimjinevnd

Fram til hin 4. september 2022 var svimjinevnd SSF: Heri Mortensen, formaður, Bjørg O. Jensen, næstforkvinna, Rúna í Skála, skrivari, Jytta Friang, varaskrivari, June Jónsveinsdóttir og Eliesar Lydersen, nevndarlimir.

Tá tóku øll uttan Bjørg O. Jensen seg úr nevndini, og leitaðu vit síðani eftir nýggjum fólkum at fara í svimjinevnd SSF, til nýggj nevnd skipaði seg hin 8. mars 2023, við Bjørg O. Jensen sum forkvinnu, Jón Bjarnasyni sum næstformanni og Rakul A. Dam sum skrivara/nevndarlimi.

Vit vilja hervið takka undanfarnu svimjinevnd fyri teirra tíð í hesi nevnd.

Svimjinevndin tekur sær av heimligu kappingunum, umframt spurningum ísv kappingarreglur SSF.

## Dómsnevnd

Hetta árið var dómsnevnd SSF: Anni á Hædd, forkvinna, Poul M. Poulsen og Jórun Eið Johannesen, nevndarlimir. Hesa tíðina var eitt mál í tveimum umførum sent dómsnevndini at viðgera.

Poul M. Poulsen hevur fráboðað at hann ynskir at fara úr dómsnevndini, og vilja vit hervið takka honum fyri drúgvu tíð síni í hesi nevnd, og í svimjinevnd SSF áðrenn tað.

## Dómarar

Útbúnu yvirdómarar SSF eru: Dann Hjelm, Elin Matras, Katja Lervig, Thurid Kjærbo, Annika N. Johannesen og Hálvdan Rúni Gaardbo. Av hesum eru Dann Hjelm, Katja Lervig og Hálvdan Rúni Gaardbo altjóða yvirdómarar, og Erling Eidesgaard og Eyðun Húsgarð altjóða startarar.

Altjóða yvirdómararnir og startararnir fingu endurnýggjað sína góðkenning nú í vetur, so at tey eru góðkend av altjóða svimjisambandinum World Aquatics (fyrr nevnt FINA), fram til árslok 2026.

Tað er tørvur á at fáa fleiri yvirdómarar, og eru vit tí farin í samstarv við Dansk Svømmeunion, um útbúgving av nýggjum dómarum. Ætlanin var at senda fólk á yvirdómaraskeið á heysti í 2022, men var hetta skeiðið tá útsett av dønum, til vónandi at verða avgreitt nú í heyst.

## Svimjiskúlin

Hálvdan Rúni Gaardbo, Pálin Olsen og Jórun Eið Johannesen eru oddafólk í Svimjiskúla Føroya, umframt at vit hava onnur afturat útbúgvin til at kunna undirvísa í skipanini. Hetta árið hevur verið lítið virksemi hjá okkum sjálvum, meðan áhugavert samstarv er byrjað við Fróðskaparsetrið, um undirvísing av serliga læraralesandi og námsfrøðislesandi í okkara skipanum.

## Lívbjarging

Sørin S. Djurhuus hevur saman við Djóna Dalsgarð staðið á odda fyri lívbjargingarátaki okkara, sum serliga fæst við at útbúgva lívbjargarar hjá føroysku svimjingini og hjá stovnum, kommunum, skúlum og øðrum felagsskapum, umframt at eftirkanna tilbúgvingina í føroyskum svimjihallum.

Tørvur hevur verið á at fáa útbúgvið nýggjar lívbjargingardómarar, sum eru tey ið upplæra og síðani eftirkanna at lívbjargarar duga tað teir skulu, og tóku vit tí nú í 2022 upp samband við Dansk Svømmeunion, so at eitt lið av nýggjum lívbjargingardómarum varð útbúgvið nú á heysti í 2022.

Sørin S. Djurhuus valdi á sumri í 2022 at gevast við sínum virksemi fyri SSF, og vilja vit hervið takka honum fyri hansara tíð hjá okkum. Uppgávurnar hjá Djóna vórðu áðrenn hetta í samráð við hann yvirtiknar av nýggja aðalskrivara okkara, og takka vit hervið Djóna fyri hansara tíð í SSF.

## Landsliðsvenjari

Hin 1. juni 2021 varð Kristian Martin Joensen settur sum landsliðsvenjari SSF, og er tað virksemið so smátt við at koma í eina fasta legu. Uppgávan er serliga at skipa fyri landsliðslegum her í Føroyum,

at fara við landsliðum til uttanlanda uppgávur, og sum heild at leggja ætlanir fyri landsliðsvirksemi okkara, í samráð við venjarar í feløgunum.

Ein avbjóðing hevur verið at fáa gongd á aftur ungdómslandsliðsvirksemi; men er tað nú eydnast við tveimum legum í vetur, har serliga Malena Hansen og Rúni Gaardbo hava stóra tøkk uppiborið.

## Skrivstova, bókhald og aðalskrivari

Hin 1. mars 2022 byrjaði Ann Ellingsgaard í starvi sum aðalskrivari hjá SSF, aftaná eitt tíðarskeið har serliga formaðurin tók sær av dagliga virkseminum, við góðari hjálp frá serliga næstformanninum Símun Michael Sørensen og skrivaranum Ólav Hansen.

Vit løgdu bragdliga til brots, og fingu í felag rættiliga nógv av skafti hetta árið, bæði av tí sum plagar at skula gerast, og av mennandi virksemi, so sum at orða eina strategi fyri SSF, at skipa fyri altjóða druknivanlukkufyribyrgingardegi, og at fáa útbúgvið nýggjar dómarar og lívbjargingardómarar.

Nú tað leið ímóti endanum av hesum fyrsta royndarári, ynskti Ann ikki at leingja sáttmálan við SSF, og hava vit tíverri aftur ikki ein aðalskrivara. Vit vilja takka Ann fyri hennara innsats í SSF, og leggja til næstkomandi starvsnevnd at avgera, hvussu gerast skal nú í sambandi við hesar uppgávur.

## Felagsskapurin

Afturat okkum sjálvum í nevndum SSF og feløgum, eru nógvar góðar kreftir í svimjingini sum vit dúva uppá, serliga í sambandi við meistarastevnur og landsliðsvirksemi. Hetta er dýrabærur stuðul, ið vit lukkutíð fáa fyri lítið og lætt.

Serliga er árligi kalendarafundurin ein góð kelda til hjálp og konsensus í sambandi við heimligu stevnurnar, umframt árliga svimjiráðstevnan, sum vit tíverri ikki hava funnið pláss til nú í tveir vetrar, vegna serliga koronu og pressaðan kalendara.

Í september høvdu vit nakar væleydnaðar strategidagar, har feløgini saman við SSF orðaðu eina strategi fyri SSF, sum liður í mentorship-verkætlan hjá FINA (nú World Aquatics).

Ætlanin er at hava ráðstevnu aftur í 2023, til at endurskoða okkara strategi, og gjarna eisini okkara reglugerðir og mannagongdir yvirhøvur. Avbjóðingin er bara sum ikki einaferð, at finna pláss í okkara kalendaranum, har flestøll viðkomandi kunnu møta.

## Limir í føroyskum svimjifeløgum

Nú í mars 2023 vóru tað 1228 limir í føroysku svimjifeløgunum, harav 400 í Havnar Svimjifelag (HS), 400 í Ægir, 162 í Svimjifelagnum FLOT, 152 í Suðuroyar Svimjifelag (SuSvim), 42 í Fuglafjarðar Svimjifelag (FS), og 72 í Svimjifelagnum Reysta.

Til samanbering vóru tað í fjør 966 limir í føroysku svimjifeløgunum, harav 350 í Havnar Svimjifelag (HS), 278 í Ægir, 133 í Svimjifelagnum FLOT, 113 í Suðuroyar Svimjifelag (SuSvim), 52 í Fuglafjarðar Svimjifelag (FS), og 40 í Svimjifelagnum Reysta.

Í 2021 vóru tey 802 skrásettir limir í føroysku svimjifeløgunum, harav 350 í Havnar Svimjifelag (HS), 143 í Ægir, 106 í Svimjifelagnum FLOT, 100 í Suðuroyar Svimjifelag (SuSvim), 67 í Fuglafjarðar Svimjfelag (FS), og 36 í Svimjifelagnum Reysta.



# Svimjiárið 2021-2022

## FINA stevnur í føroyskum svimjihallum

Føroysk svimjifeløg og SSF skipaðu hetta svimjiárið fyri 10 FINA-góðkendum svimjistevnum í svimjihallum, harav 4 meistarastevnum, har málbólkurin vóru føroysk børn, ung og vaksin. 3 svimjistevnur máttu avlýsast vegna koronu.

| Stevna | Staður | Dagfesting | Hylur | Kapp. | Feløg | Íðkarar | Lið | Úrslit | FINA* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| HS Open | Tórshavn | 11.-12.sep.21 | 25m | 41 | 5 | 64 | 25 | 439 | 674 |
| Ægir Open - avlýst | Klaksvík | 23.-24.okt.21 | 25m | | | | | | |
| FMS/JMS | Tórshavn | 12.-14.nov.21 | 25m | 86 | 5 | 57 | 52 | 605 | 682 |
| SuSvim Open | Vágur | 27.-28.nov.21 | 50m | 38 | 4 | 54 | 10 | 360 | 641 |
| ABMS - avlýst | Klaksvík | 10.-12.des.21 | 25m | | | | | | |
| SuSvim Open - avlýst | Vágur | 5.-6.feb.22 | 50m | | | | | | |
| Ægir Open | Klaksvík | 19.-20.feb.22 | 25m | 50 | 5 | 79 | 0 | 541 | 663 |
| HS Open | Tórshavn | 12.-13.mar.22 | 25m | 42 | 5 | 83 | 36 | 478 | 646 |
| SuSvim Open | Vágur | 2.-3.apr.22 | 50m | 38 | 4 | 63 | 12 | 399 | 551 |
| Atlantic Open | Vágur | 23.-25.apr.22 | 50m | 52 | 5 | 57 | 26 | 456 | 638 |
| ABMS | Klaksvík | 14.-15.apr.22 | 25m | 49 | 5 | 99 | 17 | 637 | 571 |
| FM/JM | Vágur | 4.-6.jun.22 | 50m | 80 | 5 | 56 | 33 | 562 | 703 |
| FM fyri lið | Vágur | 2.jul.22 | 50m | 24 | 5 | 39 | 7 | 80 | 624 |

## Aðrar stevnur í føroyskum svimjihallum

Føroysk svimjifeløg skipaðu hetta svimjiárið fyri 4 stuttleikastevnum, hetta svimjiárið, fyri okkara yngstu aldursbólkar: HS-stevna í Tórshavn hin 25. sep. 21, SuSvim-stevna í Páls Høll 2. okt. 21 (har tey svumu breiddir), SuSvim-stevna á Tvøroyri 5. mar. 22 og HS-stevna á Argjum 30. apr. 22.

3 stuttleikastevnur máttu avlýsast, FS-stevnan 30. okt. 21 og FLOT-stevnan 22. jan. 22 vegna støðuna við korona, og Reysta-stevnan 19. mar. 22 vegna tekniskar trupulleikar.

# Uttanlanda og altjóða stevnur

Føroyskir svimjarar eru so smátt slopnir uttanlanda aftur at kappast, hetta svimjiárið, um enn eitt bakkast var við koronu um ársskiftið 2021/22.

| Stevna | Land | Dagfesting | Hylur | Íðkarar | Lið | Úrslit | Gull | Silvur | Bronsa | FINA* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| SSG GP1 | SWE | 24-26.sep.21 | 25m | 9 | 3 | 45 | 0 | 0 | 4 | 726 |
| NM/NJM 2021 | SWE | 3.-5.des.21 | 25m | 9 | 3 | 34 | 0 | 1 | 1 | 714 |
| HMS 2021 | UAE | 16.-21.des.21 | 25m | 4 | 2 | 8 | 0 | 0 | 0 | 690 |
| RIG 2022 | ISL | 28.-30.jan.22 | 50m | 21 | 0 | 128 | 2 | 6 | 6 | 679 |
| BSF 2022 | NOR | 1.-3.apr.22 | 50m | 9 | 0 | 53 | 0 | 0 | 0 | 674 |
| HM 2022 | HUN | 18.-25.jun.22 | 50m | 2 | 0 | 4 | 0 | 0 | 0 | 710 |
| EJM 2022 | ROU | 5.-10.jul.22 | 50m | 1 | 0 | 1 | 0 | 0 | 0 | 683 |
| NMU 2022 | EST | 9.-10.jul.22 | 50m | 8 | 5 | 34 | 0 | 0 | 0 | 584 |
| EM 2022 | ITA | 11.-17.aug.22 | 50m | 2 | 0 | 5 | 0 | 0 | 0 | 682 |

# Landsliðshópar 2021-2022

## NM/NJM 2021 í Upplands Väsby, Svøríki

**Svimjarar (9)**: Elisabeth Erlendsdóttir (2005), Eyðrið Mortensen (2005), Ronja Ró í Dímun (2002) og Bartal E. Eidesgaard (2003) úr HS, Lea Osberg Højsted (2008), Róa Trygvadóttir (2008) og Heini M. Askham (2006) úr Ægir, Alisa Vestergård (2003) úr SuSvim, Jóhanna Ólavsdóttir (2007) úr FS. Vár E. Eidesgaard (2001) og Johan N. Dam (2002) úr HS vóru eisini úttikin, men góvu avboð.

**Venjari**: Kristian Martin Joensen og Panagiotis Christou

**Ferðaleiðari**: June Jónsveinsdóttir

## HMS 2021 í Abu Dhabi, Sameindu Arabisku Emirríkini

**Svimjarar (4)**: Elisabeth Erlendsdóttir (2005), Bartal E. Eidesgaard (2003) og Johan Nónskarð Dam (2002) úr HS, Alisa Vestergård (2003) úr SuSvim. Vár E. Eidesgaard var eisini úttikin, men gav avboð.

**Venjarar**: Kristian Martin Joensen og Panagiotis Christou

**Ferðaleiðari**: Lis Gøthe í Jákupsstovu

## BSF 2022 í Bergen, Noregi

**Svimjarar (9)**: Elisabeth Erlendsdóttir (2005), Ronja Ró í Dímun (2004), Eyðrið Mortensen (2003) og Bartal E. Eidesgaard (2003) úr HS, Alisa Vestergård (2003) og Bartal Debess (2002) úr SuSvim, Lea Osberg Højsted (2008) og Jonna Joensen (2005) úr Ægir, og Jóhanna Ólavsdóttir (2007) úr FS

**Venjari**: Kristian Martin Joensen

**Ferðaleiðari**: Astrid Bergtóra Joensen

## HM 2022 í Budapest, Ungarn

**Svimjarar (2)**: Vár E. Eidesgaard (2001) og Bartal E. Eidesgaard (2003) úr HS

**Venjari**: Kristian Martin Joensen

**Ferðaleiðari**: Anna Eidesgaard

## EJM 2022 í Bucharest, Rumenia

**Svimjari (1)**: Elisabeth Erlendsdóttir (2005) úr HS

**Venjari**: Panagiotis Christou

**Ferðaleiðari**: Hjørdis S. Mortensen

## NMU 2022 í Tallinn, Estlandi

**Svimjarar (8)**: Lea O. Højsted (2008), Róa Trygvadóttir (2008), Líggjas Joensen (2008) og Heini M. Askham (2006) úr Ægir, Isak Brisenfeldt (2006) og Áki Eliassen (2006) úr HS, Bjarta í Lágabø (2009) úr SuSvim og Jóhanna Ólavsdóttir (2007) úr FS

**Venjarar**: Astrid Bergtóra Joensen og Dánjal Martin Hofgaard

**Ferðaleiðari**: Danny O. Højsted

## EM 2022 í Róm, Italia

**Svimjarar (2)**: Vár E. Eidesgaard (2001) úr HS og Alisa Vestergård (2003) úr SuSvim

**Venjari**: Maciej Hampel

**Ferðaleiðari**: Sabina Poulsen

# Føroysk met og juniormet

Føroyskir svimjarar settu 14 føroysk met og 14 føroysk juniormet, hetta svimjiárið 2021-2022, tað vil siga frá 1. september 2021 til 30. august 2022.

Til samanberingar settu føroyskir svimjarar tilsamans 9 føroysk met og 4 føroysk juniormet, undanfarna svimjiárið 2020-2021.

## Føroysk met

| Teinur | Grein | Hylur | Kyn | Tíð | Svimjari | Aldur | Felag | Stevna | Dagur | Land |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4x50 | Blandað | 25m | Mix | 02:01.18 | Elin Christiansen<br>Rani Jacobsen<br>Alisa Vestergård<br>Bartal Debess | 2001 | SuSvim | HS Open | 2021-09-12 | FRO |
| 4x100 | Blandað | 25m | Mix | 04:03.50 | Elisabeth Erlendsdóttir<br>Bartal E. Eidesgaard<br>Johan N. Dam<br>Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | SSG GP1 | 2021-09-24 | SWE |
| 4x50 | Frí | 25m | Mix | 01:50.07 | Elisabeth Erlendsdóttir<br>Bjørg Ólavsdóttir<br>Bartal E. Eidesgaard<br>Dávid Gislason | 2003 | HS | FMS | 2021-11-12 | FRO |
| 4x50 | Frí | 25m | Mix | 01:43.41 | Elisabeth Erlendsdóttir<br>Bartal E. Eidesgaard<br>Eyðrið Mortensen<br>Johan N. Dam | 2002 | HS | FMS | 2021-11-12 | FRO |
| 4x100 | Frí | 25m | Mix | 04:01.31 | Bartal E. Eidesgaard<br>Ronja Ró í Dímun<br>Elisabeth Erlendsdóttir<br>Jonas L. Schiller | 2003 | HS | FMS | 2021-11-14 | FRO |
| 4x100 | Frí | 25m | Mix | 03:50.92 | Ronja Ró í Dímun<br>Johan N. Dam<br>Elisabeth Erlendsdóttir<br>Bartal E. Eidesgaard | 2002 | HS | FMS | 2021-11-14 | FRO |
| 4x50 | Frí | 25m | Mix | 01:42.65 | Bartal E. Eidesgaard<br>Johan N. Dam<br>Elisabeth Erlendsdottir<br>Alisa Vestergård | 2002 | SSF | HMS | 2021-12-17 | UAE |
| 4x50 | Blandað | 25m | Mix | 01:52.53 | Bartal E. Eidesgaard<br>Johan N. Dam<br>Elisabeth Erlendsdottir<br>Alisa Vestergård | 2002 | SSF | HMS | 2021-12-18 | UAE |

| | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4x50 | Blandað | 25m | Mix | 02:00.47 | Jonna Joensen<br>Lea Osberg Højsted<br>Heini M. Askham<br>Líggjas Joensen | 2005 | Ægir | HS Open | 2022-03-12 | FRO |
| 4x50 | Blandað | 25m | M | 01:48.36 | Bartal Debess<br>Jón Hofgaard<br>Róland Toftum<br>Rúni Dahl | 1992 | SuSvim | HS Open | 2022-03-12 | FRO |
| 800 | Frí | 50m | F | 09:06.88 | Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | HC | 2022-04-23 | HUN |
| 4x100 | Blandað | 50m | Mix | 04:25.50 | Bjarta í Lágabø<br>Jón Hofgaard<br>Róland Toftum<br>Alisa Vestergård | 1992 | SuSvim | AO | 2022-04-25 | FRO |
| 4x100 | Frí | 50m | Mix | 03:54.52 | Bartal E. Eidesgaard<br>Vár E. Eidesgaard<br>Elisabeth Erlendsdóttir<br>Isak Brisenfeldt | 2001 | HS | FM | 2022-06-04 | FRO |
| 4x100 | Blandað | 50m | Mix | 04:16.85 | Elisabeth Erlendsdóttir<br>Bartal E. Eidesgaard<br>Isak Brisenfeldt<br>Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | FM | 2022-06-05 | FRO |

## Føroysk juniormet

| Teinur | Grein | Hylur | Kyn | Tíð | Svimjari | Aldur | Felag | Stevna | Dagur | Land |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4x50 | Blandað | 25m | Mix | 02:05.16 | Jonna Joensen<br>Lea Osberg Højsted<br>Heini M. Askham<br>Líggjas Joensen | 2005 | Ægir | HS Open | 2021-09-12 | FRO |
| 4x50 | Blandað | 25m | Mix | 02:03.23 | Bartal E. Eidesgaard<br>Bjørg Ólavsdóttir<br>Elisabeth Erlendsdóttir<br>Snorri F. Mortensen | 2003 | HS | HS Open | 2021-09-12 | FRO |
| 4x50 | Frí | 25m | Mix | 01:50.07 | Elisabeth Erlendsdóttir<br>Bjørg Ólavsdóttir<br>Bartal E. Eidesgaard<br>David Gislason | 2003 | HS | HS Open | 2021-09-12 | FRO |
| 4x50 | Frí | 25m | Mix | 01:48.63 | Jonna Joensen<br>Lea Osberg Højsted<br>Heini M. Askham<br>Líggjast Joensen | 2005 | Ægir | HS Open | 2021-09-12 | FRO |

| | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4x100 | Blandað | 25m | Mix | 04:42.29 | Elin Christiansen<br>Rúni Dahl<br>Hans Jacob Hjelm<br>Bjørk L. Sørensen | 2003 | SuSvim | FMS | 2021-11-13 | FRO |
| 4x100 | Blandað | 25m | Mix | 04:31.49 | Elisabeth Erlendsdóttir<br>Ronja Ró í Dímun<br>Bartal E. Eidesgaard<br>Johannis Erlendsson | 2003 | HS | FMS | 2021-11-13 | FRO |
| 4x100 | Frí | 25m | Mix | 04:01.31 | Bartal E. Eidesgaard<br>Ronja Ró í Dímun<br>Elisabeth Erlendsdóttir<br>Jónas L. Schiller | 2003 | HS | FMS | 2021-11-14 | FRO |
| 4x100 | Frí | 25m | Mix | 03:58.80 | Lea Osberg Højsted<br>Líggjas Joensen<br>Heini M. Askham<br>Róa Trygvadóttir | 2006 | Ægir | FMS | 2021-11-14 | FRO |
| 50 | Rygg | 25m | Kyn | 00:28.63 | Elisabeth Erlendsdóttir | 2005 | HS | NJM | 2021-12-03 | SWE |
| 4x50 | Blandað | 25m | Mix | 02:00.47 | Jonna Joensen<br>Lea Osberg Højsted<br>Heini M. Askham<br>Líggjast Joensen | 2005 | Ægir | HS Open | 2022-03-12 | FRO |
| 4x50 | Blandað | 25m | Mix | 01:47.21 | Jonna Joensen<br>Heini M. Askham<br>Róa Trygvadóttir<br>Lea Osberg Højsted | 2006 | Ægir | HS Open | 2022-03-12 | FRO |
| 4x100 | Frí | 50m | Mix | 04:10.64 | Jonna Joensen<br>Lea Petersen<br>Heini M. Askham<br>Líggjas Joensen | 2005 | Ægir | AO | 2022-04-24 | FRO |
| 4x100 | Frí | 50m | Mix | 04:02.38 | Lea Osberg Højsted<br>Líggjas Joensen<br>Heini M. Askham<br>Róa Trygvadóttir | 2006 | Ægir | AO | 2022-04-24 | FRO |
| 4x100 | Blandað | 50m | Mix | 04:30.95 | Líggjas Joensen<br>Lea Osberg Højsted<br>Jonna Joensen<br>Heini M. Askham | 2005 | Ægir | AO | 2022-04-25 | FRO |

# Svimjiárið 2022-2023

## FINA stevnur í føroyskum svimjihallum

Føroysk svimjifeløg og SSF hava til nú, hetta svimjiárið, skipað fyri tilsamans 8 FINA-góðkendum svimjistevnum í svimjihallum, harav 2 meistarastevnum og 1 norðurlendskari meistarastevnu, har málbólkurin vóru føroysk børn, ung og vaksin.

| Stevna | Staður | Dagfesting | Hylur | Kapp. | Feløg | Íðkarar | Lið | Úrslit | FINA* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| HS Open | Tórshavn | 10.-11.sep.22 | 25m | 41 | 4 | 64 | 21 | 382 | 655 |
| Nordic Open Masters | Tórshavn | 30.sep.-1.okt.22 | 25m | 34 | 35 | 121 | 32 | 464 | 543 |
| Ægir Open | Klaksvík | 22.-23.okt.22 | 25m | 36 | 5 | 85 | 0 | 538 | 756 |
| ABMS Sprint | Klaksvík | 5.nov.22 | 25m | 30 | 5 | 130 | 20 | 605 | 547 |
| FMS/JMS | Tórshavn | 11.-13.nov.22 | 25m | 86 | 5 | 68 | 47 | 594 | 780 |
| SuSvim Open | Vágur | 14.-15.jan.23 | 50m | 36 | 4 | 75 | 18 | 489 | 675 |
| Ægir Open | Klaksvík | 18.-19.feb.23 | 25m | 50 | 5 | 82 | 22 | 571 | 676 |
| HS Open | Tórshavn | 18.-19.mar.23 | 25m | 43 | 5 | 105 | 37 | 631 | 692 |

### Viðmerking um Nordic Open Masters

SSF slapp í 2022 aftur at skipa fyri Nordic Open Masters 2022, sum ferðast í rotatión millum Norðurlond. Upprunaliga skuldu vit hava hesa stevnu í 2020, men kom korona ímillum tá, og síðani eitt umbýti við Sundsamband Íslands í 2021, tí at tey tá fyltu runt.

Tíverri varð hendan stevnan væl minni enn ætlað, vegna lítla undirtøku uttanlanda frá, og frá okkara feløgum. Stevnan sjálv varð væleydnað og fekk góðar afturmeldingar; men vit hava so mikið stórar trupulleikar við at fáa fólk at hjálpa til, at vit eiga at umhugsa at lata verða við at bjóða okkum fram.

## Aðrar stevnur í føroyskum svimjihallum

Føroysk svimjifeløg hava hartil til nú skipað fyri 5 stuttleikastevnum, hetta svimjiárið, fyri okkara yngstu aldursbólkar: HS-stevna á Argjum hin 8. okt. 22, SuSvim-stevna á Tvøroyri 29. okt. 22, FS-stevna í Fuglafirði 3. des. 22, FLOT-stevna á Toftum 4. feb. 22, og SuSvim-stevna í Páls Høll 4. mar. 22 (har tey svumu breiddir).

# Uttanlanda og altjóða stevnur

Føroyskir svimjarar hava til nú luttikið á minst 4 uttanlanda svimjistevnum, hetta svimjiárið, umframt at Elisabeth Erlendsdóttir og Vár E. Eidesgaard ísv skúla- og venjingaruppihald í USA regluliga kappast á 25 yards og 50m-stevnum har.

| Stevna | Land | Dagfesting | Hylur | Íðkarar | Lið | Úrslit | Gull | Silvur | Bronsa | FINA* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Køge Open | DEN | 25.-27.nov.22 | 25m | 28 | 5 | 253 | 19 | 11 | 10 | 660 |
| NM/NJM 2022 | NOR | 10.-12.des.22 | 25m | 10 | 3 | 36 | 0 | 0 | 0 | 685 |
| HMS 2022 | AUS | 13.-18.des.22 | 25m | 1 | 0 | 2 | 0 | 0 | 0 | 754 |
| RIG 2022 | ISL | 27.-29.jan.23 | 50m | 43 | 0 | 268 | 10 | 7 | 14 | 690 |

# Landsliðshópar 2022-2023

## NM/NJM 2022 í Bergen, Noregi

**Svimjarar (10)**: Lea Osberg Højsted (2008), Róa Trygvadóttir (2008), Heini M. Askham (2006) og Líggjas Joensen (2008) úr Ægir , Bjarta í Lágabø (2009, Alisa Vestergård (2003) og Róland Toftum (1998) úr SuSvim, Jóhanna Ólavsdóttir (2007) og Bárður Ólavsson (2008) úr FS, og Isak Brisenfeldt (2006) úr HS. Eyðrið Mortensen (2003), Vár E. Eidesgaard (2001), Bartal E. Eidesgaard (2003) úr HS vóru eisini úttikin, men góvu avboð.

**Venjari**: Kristian Martin Joensen, Astrid Bergtóra Joensen og Dánjal Martin Hofgaard

**Ferðaleiðari**: Rúni Gaardbo

## HMS 2022 í Melbourne, Avstralia

**Svimjari (1)**: Vár E. Eidesgaard (2001) úr HS

**Venjarar**: Jón Bjarnason

**Ferðaleiðari**: Rókur í Jákupsstovu

# Havsvimjing

Nakað av havsvimjing hevur verið, við Ólavsøkusvimjingini hjá HS, við Svimjingini um Vágna hjá Ægir á Sjómannadegnum, við Jóansøkusvimjing hjá SuSvim, og nú við eisini Tróndarsvimjing hjá FLOT.

# Føroysk met og juniormet

Føroyskir svimjarar hava til nú sett 8 føroysk met og 3 føroysk juniormet hetta svimjiárið 2022-2023, tað vil siga frá 1. september 2022 til 30. august 2023. Til samanberingar settu føroyskir svimjarar tilsamans 14 føroysk met og 14 føroysk juniormet, undanfarna svimjiárið 2021-2022.

## Føroysk met

| Teinur | Grein | Hylur | Kyn | Tíð | Svimjari | Aldur | Felag | Stevna | Dagur | Land |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4x50 | Frí | 25m | Mix | 01:42.33 | Bartal E. Eidesgaard<br>Eyðrið Mortensen<br>Vár E. Eidesgaard<br>Isak Brisenfeldt | 2001 | HS | FM | 2022-11-11 | FRO |
| 400 | Frí | 25m | F | 04:14.09 | Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | FM | 2022-11-12 | FRO |
| 4x100 | Blandað | 25m | Mix | 04:05.36 | Eyðrið Mortensen<br>Bartal E. Eidesgaard<br>Isak Brisenfeldt<br>Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | FM | 2022-11-12 | FRO |
| 4x100 | Frí | 25m | Mix | 03:45.58 | Vár E. Eidesgaard<br>Eyðrið Mortensen<br>Isak Brisenfeldt<br>Bartal E. Eidesgaard | 2001 | HS | FM | 2022-11-13 | FRO |
| 50 | Bringa | 25m | Mix | 00:28.30 | Róland Toftum | 1998 | SuSvim | NM | 2022-12-11 | NOR |
| 100 | Frí | 25m | F | 00:56.21 | Vár. E. Eidesgaard | 2001 | HS | HMS | 2022-12-14 | AUS |
| 50 | Bringa | 50m | F | 00:34.31 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | RIG | 2022-01-27 | ISL |
| 50 | Bringa | 50m | M | 00:29.36 | Róland Toftum | 1998 | SuSvim | RIG | 2022-01-29 | ISL |

## Føroysk juniormet

| Teinur | Grein | Hylur | Kyn | Tíð | Svimjari | Aldur | Felag | Stevna | Dagur | Land |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4x100 | Blandað | 25m | Mix | 04:16.83 | Líggjas Joensen<br>Lea O. Højsted<br>Jonna Joensen<br>Heini M. Askham | 2005 | Ægir | FM | 2022-11-12 | FRO |
| 4x200 | Frí | 25m | Mix | 07:58.23 | Isak Brisenfeldt<br>Bárður Ólavsson<br>Heini M. Askham<br>Líggjas Joensen | 2006 | SSF | NM | 2022-12-10 | NOR |
| 50 | Bringa | 50m | F | 00:34.31 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | RIG | 2022-01-27 | ISL |

# Annað virksemi 2021-2023

## Altjóða virksemi

SSF luttekur so vítt gjørligt altíð á teimum altjóða pallum, har vit væntast at luttaka, so sum í norðurlendska svimjisambandinum NSF, í norðurlendska lívbjargingarbólkinum NLSG, í evropeiska svimjisambandinum LEN, í altjóða svimjisambandinum FINA (nú World Aquatics), umframt nú eisini í evropeiska lívbjargingarsambandinum ILSE og altjóða lívbjargingarsambandinum ILS.

Í tíðarskeiðnum síðani seinasta aðalfund, vóru tiltøkini í øllum førum (íroknað ætlaðu tiltøk):

- 18. september 2021: Stovnandi E4AA-fundur í Zagreb, Kroatia
- 24. september 2021: NSF ársfundur í Budapest, Ungarn
- 25. september 2021: LEN kongress í Budapest, Ungarn
- 17. desember 2021: NSF fundur í Abu Dhabi, Sameindu Arabisku Emirríkini
- 18. desember 2021: FINA eyka-kongress í Abu Dhabi, Sameindu Arabisku Emirríkini
- 19. januar 2022: NSF aðalskrivarafundur á netinum
- 5. februar 2022: LEN eyka-kongress í Frankfurt, Týsklandi
- 11. - 12. apríl 2022: Vitja FINA & LEN forsetan í Amsterdam (FINA rindaði)
- 14. mai 2022: NSF fundur í Cascais, Portugal
- 15. mai 2022: LEN eyka-kongress í Cascais, Portugal
- 19. juni 2022: FINA eyka-kongress í Budapest, Ungarn
- 20. - 22. juni 2022: FINA Mentorship verkstova í Budapest, Ungarn
- 21. oktober 2022: NSF ársfundur í Antalya, Turkalandi
- 22. oktober 2022: LEN kongress í Antalya, Turkalandi
- 12. desember 2022: FINA eyka-kongress í Melbourne, Avstralia
- 13. desember 2022: FINA development fundur í Melbourne, Avstralia
- 14. desember 2022: FINA Mentorship framløga í Melbourne, Avstralia
- 18. - 19. januar 2023: NSF aðalskrivarafundur í Helsinki, Finnlandi
- 2. mars 2023: NLSG-fundur á netinum (fyrsti NLSG-fundur síðani 2019, vegna korona)

Serliga ísv FINA Mentorship verkætlanina og formanskapin hjá okkum í NSF, hava ein røð av ávegis netfundum verið eisini, sum ikki eru listaðir upp her, sum upptakt til listaða virksemi.

# Onnur SSF-tiltøk

SSF roynir eftir førimuni at skipa fyri stimbrandi tiltøkum í Føroyum og fyri føroyingar, afturat sjálvum kappingunum, til at betra um samstarv og førleikar hjá okkum innan svimjingini, og til at vaksa um áhugan fyri svimjing sum heild.

Í tíðarskeiðnum síðani seinasta aðalfund, vóru tiltøkini í øllum førum (íroknað ætlaðu tiltøk):

- 17. - 19. september 2021: Landsliðslega í Klaksvík
- 18. september 2021: Svimjiskúlaskeið á Toftum
- 6. desember 2021: 200m-átak sjósett
- 2. mars 2022: Kalendarafundur í Saltangará
- 18. - 20. mars 2022: Landsliðslega í Klaksvík
- 18. - 20. mars 2022: Dómaraskeið í Tórshavn
- 10. - 12. juni 2022: Landsliðslega í Vági
- 25. juli 2022: Altjóða druknivanlukkufyribyrgingardagur
- 3. - 4. august 2022: Strategidagar SSF
- 16. - 18. september 2022: FINA hjálparvenjaraskeið í Havn - Avlýst, ov lítil undirtøka
- 16. - 18. september 2022: Landsliðslega í Havn - Avlýst, fingu ikki pláss í hylinum
- 23. - 24. september 2022: Lívbjargingardómaraskeið
- 8. oktober 2022: Forfólkafundur í Tórshavn
- 18. - 20. november 2022: Landsliðslega í Klaksvík
- 18. - 19. november 2022: Ungdómslandsliðslega í Fuglafirði og á Toftum
- 10. - 11. februar 2023: Ungdómslandsliðslega í Vági
- 10. - 12. februar 2023: Juniorlandsliðslega í Vági
- 24. februar 2023: Kalendarafundur í Tórshavn

# Stutt um okkara limaskapir

## ÍSF

ÍSF skipar tvær ferðir um árið fyri umboðstingum, har formenn og -kvinnur í sersambondunum møtast til at viðgera ymisk viðurskifti, ímillum árligu aðalfundir. Hetta seinasta árið hevur viðgerðin verið um m.a. nýggju strategi ÍSF, um ætlaða ÍSF-húsið, um altjóða puljur og um barnaváttanir. Hartil fundast vit árliga við fíggjarnevnd ÍSF, um aktuellu støðuna og framtíðar ætlanir.

## NSF

SSF yvirtók í 2021 forfólksskapin í norðurlendska svimjisambandinum NSF, tá ið ársfundur var hin 24. september 2021. Nógv virksemi hevur verið síðani tá, vegna stríðsvalið í LEN sum byrjaði um somu tíð, og síðani serliga vegna russisku innrásina í Ukraina í 2022. Nógvir netfundir hava verið, umframt fysiskir fundir tá ið høvi beyðst. Danmark tekur yvir formanskapin, nú í 2023.

## LEN

Undirritaði SSF-formaður er síðani februar 2022 bureaulimur í LEN, við ábyrgd fyri serliga miðlan og svimjiførleika. Hetta eru spennandi uppgávur, har vit millum annað hava umskipa miðladeildina, og skift út heimasíðuna, umframt ísv svimjiførleika arbeitt við einum evropeiskum standard fyri vatntryggleika og svimjiførleika, sum væntandi verður klárur at vísa fram nú í 2023.

## FINA

Í FINA varð nýggjur forseti valdur á kongressini í Doha í juni 2021, sum viðførdi útskiftingar í leiðsluni umframt rættiliga stórar broytingar í, hvussu hesin altjóða felagsskapur ætlar at virka. Millum annað er evstalógin nú rættiliga umfatandi broytt, til millum annað at skula tryggja betri javnstøðu umframt møguleikar hjá íðkarum at vera hoyrdir og hava ávirkan.

## ILS/ILSE/NLSG

Í altjóða lívbjargingini var eisini hetta árið sera friðarligt, vegna koronufarsóttina. Mesta virksemið hevur verið útsett, millum annað so at ráðstevnan sum skuldi vera í Sri Lanka á heysti í 2022, nú verður í Avstralia í desember 2023, og valaðalfundurin fyrst í 2024. Í norðurlendska partinum NLSG hevur eisini verið friðarligt, men ætla tey nú aftur ársfund, aftaná summarferiuna í 2023.

# Onnur tiltøk

## Úrval

Úrval játtaði til 2022 oyramerktan stuðul til hesar hesar 2 svimjarar: Vár E. Eidesgaard (2001) og Elisabeth Erlendsdóttir (2005). Harumframt aftur játtan til '15 tey næstbestu'.

Til 2023 játtaði Úrval aftur oyramerktan stuðul til hesar 2 svimjarar: Vár E. Eidesgaard (2001) og Elisabeth Erlendsdóttir (2005). Hinvegin varð einki játtað til '15 tey næstbestu'.

Umsitingarvirksemið hevur verið heldur tungt, vegna broyttar ætlanir og misskiljingar millum Úrval, SSF og viðkomandi íðkarar. Tíbetur er ÍSF nú farið undir at endurskoða úrvalsskipanina.

## Landslið

Aftaná eina árarekkju, har vit hava kláráð okkum við at velja út venjarar úr feløgum til hvørja landsliðsuppgávu sær, valdi SSF í juni 2021 at seta Kristian Martin Joensen til landsliðsvenjara, við teimum uppgávum sum hartil hoyra.

Í fyrstanini órógvaði korona nógv, umframt at finna pláss fyri legunum í fylta kalendara okkara. Men, eftirhondini er hetta komið í eina rættiliga fasta legu, har 1-3 landsliðslegur eru hvørt hálvár, og hartil regluligt samskifti millum landsliðsvenjara og høvuðsvenjarar í feløgum um landsliðsvirksemið.

## FOASP

SSF hevur síðani 2018 gjørt íløgur í testútgerð og annað, sum liður í sokallaðu FOASP verkætlanini, har FINA bjóðar fíggjarligan stuðul til menning fram ímóti OL. Útgerð er keypt og roynd; men tíverri hevur tað verið trupult at fáa í veruliga nýtslu, vegna venjaraskifti í feløgum, og korona.

Vit skiftu tí til at søkja um stuðul til sovorðið, ið var rættiliga vist at verða gjøgnumført, sum til 2021:

1) Víðkan av loysnini hjá SSF til stroyming frá svimjistevnum
2) Keyp av stevnuskipanini Tempus
3) Skeið fyri nýggjum dómarum
4) Viðlíkahald av testútgerð

Tíverri mátti dómaraskeiðið avlýsast vegna væntandi undirtøku, tað árið, meðan hini trý punktini vórðu avgreidd sum ætlað, við onkrum eyka ískoyti eisini.

Til í 2022 gjørdu vit umsóknina enn einfaldari, har søkt er um stuðul til heilt tryggar loysnir, ið vóru:

1) Stevnuskipanin Tempus
2) Hald (forrit) ísv stroymingarloysnina
3) Hald (forrit) ísv testútgerð
4) Skeið fyri nýggjum dómarum
5) Luttøka á Bergen Swim Festival 2022

Hetta gekk sum ætlað, íroknað dómaraskeið og Bergen Swim Festival 2022, so at vit fingu brúkt stuðulin fult út í samsvar við umsóknina.

Til í 2023 hevur FINA (nú World Aquatics) umskipað hesa skipan, so at vit millum annað skulu brúka pengar til 'good governance' umframt til virksemi, ið er beinleiðis til gagns fyri svimjarar.

Vit hava tí søkt um stuðul til hesi tiltøk í 2023, og hava fingið játtan frá World Aquatics:

1) SSF ráðstevna um good governance
2) Hald (forrit) ísv stevnuforrit okkara (Tempus, WinGrodan, SwimRankings)
3) Útbúgving av nýggjum yvirdómarum
4) Hald (forrit) og menning av okkara stroymingar- og upptøkuloysn
5) Ungdómslandsliðslegur
6) Luttøka á uttanlanda stevnu við ungdómslandsliðnum

Stuðulin frá FINA var USD 15.000 í 2022, har hann til í 2021 var USD 20.000. Orsøkin til hesa minking var, at nýggja FINA í september 2021 innførdi eina røð av krøvum til 'good goverance', har vit vóru mett til at vera á 'basic' støði, ið gevur USD 15.000. Vegna serliga ábøtur, sum tá vórðu samtyktar á aðalfundi SSF í 2022, og virksemi annars til at bøta um okkara 'good governance', hava vit nú megnað at flyta okkum upp á 'high' støði, sum útloysti USD 30.000 í stuðli til í 2023.

## FINA Mentorship verkætlan

FINA bjóðaði okkum á vári 2022 at verða 1 av 10 londum í eini nýggjari 'mentorship' verkætlan, til at styrkja um 'good governance'. Vit tóku av, og luttóku so fyrst við aðalskrivara og formanni á verkstovu ísv HM í Budapest í juni, fyri síðani at arbeiða víðari sjálvi og saman við FINA og hinum londunum á netfundum, fyri síðani at leggja fram ísv HMS í Melbourne í desember.

Hetta var bæði áhugavert og gevandi, serliga tí at eksterni konsulenturin hjá FINA sum væntað var sera kompetentur, og tí at vit tann vegin fingu tætt samband við aðrar lyklapersónar hjá FINA. Ítøkuliga úrslitið er strategiin, sum vit saman við feløgum okkara tilevnaðu á strategidøgunum í september 2022, ið vit nú royna at arbeiða út í frá, og at fáa eftirmetta gjarna longu nú í 2023.

## World Drowning Prevention Day

Altjóða lívbjargingarsambandið ILS heitti í mai á okkum limalond, um fyri aðru ferð at seta sjóneykuna á World Drowning Prevention Day, sum ST í 2021 samtykti at skula vera hin 25. juli. Í 2021 náddu vit í Føroyum tíverri ikki at gera so nógv burturúr, fyri so nú í 2022 at gera nógv meira burturúr, við bláum ljósi í undirsjóvartunlum og á bygningar, við lýsingum á stórskíggjum runt um í landinum, og við bási í SMS. Eisini sjósettu vit serligu heimasíðuna druknifyribyrging.fo

Hetta var eitt fyri okkum stórt tiltak, at skipa fyri soleiðis í summarfrítíðini stutt uppundir Ólavsøku, og hava afturmeldingarnar verið sera jaligar. Men, hetta var arbeiðskrevjandi, og er tað tí ivasamt um, hvussu verður við endurtøku nú í 2023. Kanska vit finna eina minni arbeiðskrevjandi loysn.

## Útbúgving

Í mars 2022 fingu vit endiliga útbúgvið ein hóp av dómarum aftur, aftaná eitt tíðarskeið har serliga korona órógvaði. Vit høvdu FINA-skeið í boði bæði til dómarar og venjarar, sum tíverri máttu útsetast vegna avbjóðingar við koronu, og síðani avlýsast vegna væntandi undirtøku.

Á heysti 2021 gjørdi SSF eina formliga avtalu við Dansk Svømmeunion, sum viðførdi eitt væleydnað dómaraskeið í mars 2022, umframt eitt líka væleydnað lívbjargingardómaraskeið í september 2022.

Verri hevur verið við venjaraskeiðum. Tað eydnaðist ikki at fáa nóg nógv at melda til ætlaða FINA hjálparvenjaraskeiðið í september 2022, og varð tað tí avlýst, umframt at FINA segði nei til at bjóða okkum skeið aftur í 2023. Tað hevur eisini verið trupult at fáa fólk at melda til okkara egnu skeið í Merkjaskipanini, og er tað virksemið tí mestsum dottið niðurfyri her hjá okkum.

Men, í 2022 fóru vit undir samstarv við Fróðskaparsetur Føroya, at bjóða skeið í Merkjaskipanini og í lívbjargingarskipanini til læraralesandi og námsfrøðislesandi, og varð tað tí gjøgnumført í fleiri umførum í 2022 umframt, at vit fara undir tað aftur nú í 2023. Hetta er sjálvsagt sera jaligt, at soleiðis koma inn í skúlaskipanina við okkara svimjiførleika- og lívbjargingarskipanum.

## Tøkni

SSF mennir javnt og samt um sínar tøkniligu skipanir, til at lætta um hjá okkum og øðrum í felagsskapinum, væl vitandi at tað serliga er arbeiðskraftin, sum er fløskuhálsur í føroyskari svimjing. Í 2021 var stevnuskipanin Tempus okkara stóra íløga, har keypið tí eisini varð lagt fyri sjálvan aðalfundin at góðkenna, og har royndirnar nú tíbetur hava verið sera góðar.

Nú er nógv lættari hjá luttakandi feløgum at melda til svimjistevnur, og nógv færri trupulleikar av væntandi tilmeldingum, samstundis sum fyriskiparar og SSF hava fingið betri amboð til at seta upp stevnur og fylgja við. Øll føroysk svimjiúrslit verða nú skrásett eisini har til framtíðar uppslag og greining, og sum aftur kann brúkast til dømis til úttøku av landsliðum og vísing av styrkislistum.

Til í 2022 og 2023 høvdu og hava vit sum so ongar aðrar ætlanir við tí tøkniliga, enn at styrkja um hesar loysnir ið rigga, og at áhaldandi royna at minka um kompleksitetin. Serliga loysnin til stroyming og videoupptøku er viðkomandi, til at vísa fram ítrótt okkara, og vónandi upp á sikt gera tilfar til at lætta um frálæruna í svimjing og lívbjarging.

## Antidoping

Føroysk svimjing tekur sjálvsagt fult undir við miðvísa arbeiðinum hjá ÍSF saman við Antidoping Danmark og øðrum at basa møguligari doping í ítrótti. Tí hava vit eisini eftir áheitan frá ÍSF lagt hendan boðskap út á heimasíðu okkara, við leinki til viðkomandi myndugleikar.

## GDPR

Í 2021 kom nýggja løgtingslógin um vernd av persónupplýsingum í gildi, sum eisini vit ítróttarsambond og -feløg mugu halda okkum til. Tað kom kanska eitt sindur knappliga á breddan, men er tað so smátt við at koma undir húðina, at minka um og ansa eftir persónligum upplýsingum.

## Breidd

Í desember 2021 skipaði SSF endiliga fyri einum rættiligum breiddartiltaki aftur, tá ið vit sjósettu svimjiførleikaátakið “Klárar tú 200?”, við sjálvum løgmanni sum fyrsta svimjara, og við góðari hjálp frá svimjihallum og eldsálum runt landið. Tilsamans vóru tey knøpp 1400, sum svumu seg til hesa nál, at prógvað, at tey eru svimjarar. Avgerð er ikki enn tikin um møguliga endurtøku.

## Svimjiførleiki

Í 2021 gjøgnumførdu vit eina svimjiførleikakanning, sum vit tíverri ikki enn hava haft stundir at greina, har vaksin vórðu spurd umvegis Gallup-kanning, og har øll fimtafloksbørn í Føroyum síðani vórðu spurd við spurnarbløðum í skúlunum. Alt tilfarið er komið inn, og er nú tøppað inn á teldu, men væntar enn tíð til at greina úrslitini.

## Svimjihallir

Umboð fyri SSF eru í fyrireikingarbólkum bæði í sambandi við ætlaða langhylin í Tórshavn, og við ætlaða stutthylin í Runavík. Hetta er virksemi, sum krevur tol, men komu vit á heysti 2020 til tað stóru løtu, at byrjað var uppá langhylin í Tórshavn. Eftir ætlan stendur hann vónandi klárur í 2024, meðan tann í Runavík væntandi verður liðugur fyrst í 2025.

## Navnabroyting

Sum samtykt á aðalfundin SSF í 2022, hevur Svimjisamband Føroya valt at vilja broyta sítt enska heiti og sína offisiellu landakotu, frá "Faroe Islands Swimming Association" og "FAR", til "Faroe Islands Aquatics Federation" og "FRO". Umsóknin varð eftirfylgjandi góðkend FINA (nú World Aquatics), og eita vit tískil nú í altjóða høpi "Faroe Islands Aquatics Federation", við landakotu "FRO".

## Skrivstova hjá ÍSF

Sum avleiðing av byrjanini uppá langhylin í Havn, var ÍSF-húsið tikið niður á heysti í 2020, ið so aftur viðførdi, at SSF vegna goymslutørv flutti til góðar umstøður hjá Runavíkar kommunu í Saltangará. Har eru vit enn, umframt at aðalskrivarin fekk pláss at kunna arbeiða eisini í fyribils ÍSF-húsinum á Frælsinum í Havn. Serliga goymsluplássið er kærkomið, í Saltangará.

## Stuðlar

Høvuðsstuðul hjá Svimjisambandi Føroya er Atlantic Airways, sum hevur verið hollur stuðul í nú mong ár. Hartil hava vit nógvar aðrar trúgvar stuðlar serliga í sambandi við okkara meistarastevnur, umframt at fáa góðan stuðul frá teimum kommunum og felagsskapum, sum vit nú einaferð hoyra til. Til lívbjargingarátakið fingu vit hartil hollan stuðul frá serliga Betri stuðulsgrunninum, og njóta vit hartil gott at tí holla stuðli, sum vit fáa frá Løgtinginum og Veddingini umvegis ÍSF, umframt frá stuðulsskipanum ÍSF og Úrvals, og frá stuðulsskipanunum hjá World Aquatics og LEN.

# Niðurløga

Hetta var so mítt níggjunda ár sum formaður SSF, ella 8½ um vit taka við, at vit í 2018 fluttu aðalfundin frá at vera um heystið, til í staðin at vera aftur longu um várið í 2019.

Líka undantikið fyrstu tveir mánaðirnar í 2022, tá ið vit aftur fingu ein hvøkk við avlýsingum vegna korona, hevur tað verið við fullari skrúvu, at royna at fáa avgreitt alt tað, sum vit plaga at gera, umframt at innheinta ymiskt sum varð útsett, og at taka upp annað eisini, sum nú kom afturat.

Yvirhøvur eru vit í eini broytingartíð, har World Aquatics og LEN endurskoða alt sítt virksemi, við umfatandi revidering av sínum reglugerðum og mannagongdum, og við nýggjum leiðslum eisini, alt meðan stóravbjóðingar hótta, so sum kríggið í Ukraina og spurningurin um, hvar tvørkynd hoyra til.

Her í Føroyum hevur ÍSF sum kunnugt samtykt eina nýggja strategi, og hava vit so arbeitt við okkara eisini, út frá tí hjá ÍSF, og út frá ynskjum og ráðum frá eisini World Aquatics. Ætlanirnar eru uppá allar mátar góðar, men her eru tíverri enn í so fáar hendur at fremja alt í verki.

Tað vildi verið gott at kunnað tikið eitt time-out, til at meira umfatandi endurskoða okkara skipan, og tí er ynski um eina sovorðna ráðstevnu nú i 2023. Trupulleikin er bara, at vit samstundis hava t.d. luttøku á 10 altjóða stevnum á skrá, bara nú í 2023, umframt at skula fyriskipa 5 meistarastevnur.

Tað skal nokk ganga, men tað er trupult hjá okkum at fáa tíðina at røkka til. Tørvur er á at finna loysnir, sum krevja minni av okkum sjálvbodnu, og/ella at umhugsa at seta fólk til at taka sær av tí, serliga um vit eisini skulu orka uppgávurnar innan svimjiførleika og lívbjarging.

Eina hjartans tøkk til tykkum mongu sum hjálpa til við øllum hesum ymiska, sum vit fáast við í føroysku svimjingini. Tit vita hvørji tit eru, og at tað sum tit gera, ger mun.

Bestu eydnu í komandi ári.

við svimjikvøðu,

Saltangará 22. mars 2023
vegna starvsnevnd SSF
Rókur í Jákupsstovu